Minningarorð

# Lydia Johannesen

f. 04.03.1943 - d. 07.09.2000



Ja, dáttligt komu boðini hósdagin tann 07. sept., at tú góða Lydia ikki vart ímillum okkum longur.

»Best sum sólin fagra skínur, deyðn inn um dyrnar trínur.« Ja, sannleikan í hesum orðum mugu vit ásanna enn einaferð. Lítið vardi tað meg, at vit sóust fyri síðstu ferð, tann dagin á keiini, tá ið Vesturvón kom heim av fiskiskapi.

Siti og hugsi um teg, og tankarnir leita aftur í tíðina til barnaárini har vit sum smágentur leiktur við barnsins lætta lyndi. Tíðin var okkara, lívið ljóst og lætt fyri framman. Vit gjørdust tilkomnar, blivu giftar, fingu børn. Ja, tíðin rennur sum streym0ur í á. Árini gingu, børnini vuksu, fóru hvør í sína ætt.

Góða Lydia, tú vart ein góð kona og mamma. Tú gekst høgt uppí børnini, tey vóru titt eitt og alt. Tú fjálgaði um heimið og altíð vart tú blíð at koma inn til. Altíð vart tú tilreiðar at rætta eina hjálpandi hond og tað mundu vera fáar konfirmatiónir tú ikki vart biðin at kóka tínar vælumtóktu kleynir.

Gott var vinalagið og samanhaldið millum okkum konurnar »niðri í Setrinum«.Tíðin var ein onnur. Vit vitjaðu ofta hvørja aðra, sótu við stokkum, fóru túrar við børnumum. Óteljandi ferðir vóru vit við teimum á seiðabergi.

Ja mong og rík eru minnini.

Ymiskt er sum lagnutráurin verður spunnin. Bert 57 ára gomul vart tú kalla heim til Harran. Títt lívsljós var niðurbrunni.

Góði Christian, Tommy, Torfinn, Christly og Tony-Heri. Stórur er saknurin, tit hava mist eina góða konu og mammu. Eg havi djúpa samkenslu við tykkum. Eg hugsi nógv um tykkum í hesu sváu tíð.

Svárt má tað eisini verða hjá tær Siggi-Mia, tí Lydia var tín eygnasteinur.

Má harrin styrkja tykkum í sorgini.

Góða Lydia, tú verður ikki gloymd, men í hjartanum væl goymd

**Vinkona tín Kristina**

# Vilhjálmur Mohr Patursson

f.03.10.1918 – d. 13.08.2000

»Hvat gott veitst tú,« kundi Vilhjálmur spyrja, tá ið tú møtti honum ella, »Veitst tú einki nýtt?«

Síðan 1980 hava vit verið grannar, men eg hevði møtt honum áðrenn. Haldi tað var fyrst í sjeyti árunum, tá umvældi hann vegin til Kirkjubøar, har hann við vegjegaran hevði sett steinar, sum hann helt verða verdar at hyggja at. Nakrir standa uppi enn, og plagdi eg at vísa ferðafólki á teir, og gera vart við, at markið millum abstrakta list og gerandisdagin ikki er so stór, sum tað mangan verður gjørt til.

Møtti honum eisini til ymsar fundir. Hann tók ikki orðið í tíð og úrtíð, men tú gav tær far um tað sagda. »Tað mátti borið til« ella »men tit eru ung, tit skilja alt betur«. Tað er bara at fara til verka. Eg eri ein arbeiðsmaður og tað skammist eg ikki við,« segði hann einaferð og legði afturat:»Fólk halda enn, at ein arbeiðari er ein maður, sum gongur við einari trillibøru, hakkara og spaka.«

Villhjálmur var morgunmaður, og tú skuldi verað týðliga á fótum fyri at síggja hann, um tú hugdi út, koma í sovukamarsvindeygað, drega gardinurnar frá og hyggja at veðrinum. Týðliga leygarmorgnar kundi hann vælhýrdur koma í handilin hjá Eli at keypa ein tubbakspakka ella eitt blað. Tá hevði hann longu verið uppi á Oyggjarvegnum og rudda kava. Ballaði eina sigarett, gav tær pakkan, segði frá onkrum ella spurdi, hvat eg helt um hetta og hatta, men áðrenn sigarettin var roykt, var hann farin. Hann tosaði ikki tíðina burtur, men fólkakærur sum hann var, støðgaði hann altíð á fyri at fáa sær eitt lítið prát.

Í 1981 var eg teir seinastu mánadagarnar av skúlaárinum lærari í Syðradali á Streymoynni. Tá koyrdi eg ofta við teimum um vikuskiftini. Tað var stuttligt at uppliva, hvussu væl teir arbeiddu saman og sampakkaðu. Fyri teimum var arbeiðið eingin byrða. Teir fingu eina játtan um árið, og fyri hana kýtu teir seg á at fáa so langt vegastrekki sum gjørligt.

Tá ið hann, farin um tey sjeyti, var farin frá kundi hann ein góðan sunnudag biðja meg koma út at koyra. Nakrar ferðir fóru vit til Syðradals. Tá segði hann mær, at vegurin var teknaður upp eitt strekki annarleiðis, men hann hevði fingið hann broyttan, tí hann kom at liggja eins gott og var bíligar at gera. »Soleiðis er, teir eru góðir til sítt, men kunnu ikki vita alt, tá skuldu vit, sum eru praktiskir og nærri staðnum siga okkara hugsan. Er skil í, og teir eru skilagóðir, taka teir eftir tí. Teir vera ikki minni menn fyri tað, tvørturímóti.«

Ein maður segði fyri mær, nú Vilhjálmur var farin, at Vilhjálmur hevði sagt við Mikkjal Helmsdal.»Eg kann gera ein veg til Norðadals, sum verður brúkbarur, ódýrur, og at teir ikki noyast at bíða eftir honum í áravís« Í mong ár hevur vegurin verið til gleði og gang. Tað síðsta arbeiði hann tók uppá seg, tá var hann fráfarin, var vegurin út á Bø við Kirkjubø. Har hevði hann so mangan gingið frá óvitaárunum av.

Nakað eftir at vegurin var liðugur bjóðaið hann mær við í bilin. Tá vísti hann mær á, hann hevði klovið eina bobbins at seta í eina á omanfyri vegin. Áin at Sálarbótará. Nú kundu fólk fáa sær ein vatndropa sum fyrr.

Tíðliga ein morgun um páskirnar kom hann inn og vildi vita, hvat eg helt um katolikkar, tá ið eg hevði svara honum, segði hann: »Vit báðir fara í katolikkakirkjuna í dag«. Og so var.

Dagin eftir ein ólavsøkudag fór eg og tveir vinmenn gangandi niðan við Sandá í besta summarveðri. Komnir niðan áraka trøðina hjá Vilhjálmi, sóu vit, at hann hoyggjaði og hevði nógv fyri. Vit ivaðust eina løtu, um vit skuldu órógva hann soleiðis, men beint sum hann fekk eyga á okkum, rópti hann okkum til sín. Hann bað okkum koma við inn í húsið, meðan hann fregnaðist um ólavsøkuna. Innkomnir gav hann okkum blíðskap. Ballaði eina sigarett og gav mær pakkan. Tá ið mín sigarett var hálvroykt, segði hann: »Eg má fara út aftur, men tit kunnu bara sita fyri tí.« Eg bjóðaið mær til at koma og hjálpa honum, men tað vildi hann ikki hoyra. »Far tú bara við teimum. Njót løtina og tað góða veðrið. Hetta er ikki meir enn eg havi at spæla mær við.«

Bara eini tvey ár eftir, at hann var givin at arbeiða, bleiv hann sjúkur, so trongur fyri bróstinum. Fólk óttaðist tað versta og harmaðist um, at honum ikki skuldi unnast nøkur góð ár aftaná eitt langt arbeiðslív, tí betur var sjúkan ikki illkynja, men hann fekk boð um at gevast við at roykja.

»Nei har var einki við at gera. Boðini vóru sólarklár. Tað fyrsta eg gjørdi, eg kom út aftur var at blaka alt sum eg hevði við royking at gera burtur. Tað var hart, men eg kláraði tað. Eg skuldi klára tað.«

Nakað eftir hetta segði hann fyri mær, at ein skildkona, sum hevði roynt at leggja av at roykja, var komin glað til hansara, nú hon hevði hoyrt um, at hann hevði klára tað, og hevði sagt: »Nú mást tú siga mær, hvussu eg skal gera.« Hann prikaði fleiri ferðir við fremstafinguri í bringuna og segði: »Hygg her tað er tú og bara tú, sum kann hjálpa tær, tú skalt siga við teg sjálvan: »Nú haldi eg uppat.«

Vilhjálmur var kirkjubøingur og góður við staðið og alla sína familju, men aldrin hoyrdi tú farran av reypi ella tílíkt. At hava eitt so kent navn mundi ikki altíð vera stuttligt, men hann orkaði at bera tað og eisini verja tað um neyðugt. Bróðurin Jóannes, sum festi, varð ikki gamal maður. Vilhjálmur rak altíð við bróðursoninum, og frøddist um, at tað gekst honum væl, eisini tvíburðabróðrinum, Tróndi. Sjálvur hevði hann góðar hendur og eyga fyri standmyndum.

Vilhjálmur hevði nógvar góðar eginleikar, sum gjørdi fólki mun, ið møtti honum, men hann var eingin jabróður. Hann segið sína hugsan: »Vit eru ósamdir, tað er alt í lagi við tí,» kundi hann so siga við einum brosi.

Sum fólk flest var hann góður við síni, men konuna nevndi hann ofta. »Eg havi fingið eina góða konu,« kundi hann siga, og sum ein annar trúboðari boða, hvussu stóran týdning konan hevði fyri heimið.

Beint sum tað frættist, at Vilhjálmur var deyður møtti eg eini yngri konu, sum øll barna- og unglingaárini hevði verði næsti granni hansara. Hon helt eisini tað vera løgið, hóast árini vóru har, at hann ikki var longur. Mintist aftur á, at hon, sum var so nógv uppi í rossum, tað var hann eisini, plagdi at fara til hansara og sleppa út á trøðna við honum.Við einum fittum sorgkendum brosi, eitt sindur umskyldandi, segði hon: »Hann var sum ein hetja fyri mær«

**Steinbjørn B. Jacobsen**

# Vandi fyri fleiri skriðulopum í Kalsoynni

*Tað er ikki væntandi, at ferðasambandið í Kalsoynni kemur aftur í rættlag heilt enn*

Áki Bertholdsen

**Kalsoy:** Ferðasambandið í Kalsoynni er ikki komið í rættlag aftur enn, aftaná áarførið herfyri.

Tað nógva regnið fekk fleiri skriður at loypa og m.a. vóru fleiri metrar av vegnum í Kalsoynni skolaðir í havið.

Hetta hevur darvað ferðasambandinum í Kalsoynni almikið og eitt nú fæst ikki mjólk úr summum bygdum í oynni.

Fleiri hava funnist at Strandferðsluni tí tey halda, at hon hevur ikki gjørt nóg mikið fyri at fáa ferðasambandið í rættlag aftur.

Men hesum vísir Strandferðslan aftur

Hon sigur, at sum støðan er, eru tað óráð at royna at flyta fólk um skriðulopið, hvørki beint ígjøgnum tað, ella undir sjálvari skriðuni

Strandferðslan sigur, at hon hevur kannað málið saman við serfrøðingum hjá Landsverkfrøðinginum og niðurstøðan er, at tað er ikki ráðiligt at flyta fólk um skriðuna, hvørki ein ella annan veg.

Ein orsøk til tað er, at vandi er fyri fleiri skriðulopum har á leiðini, tað er ein spurningur um, hvussu vátt tað verður.

Ein onnur orsøk er, at tað liggur ein tíggjutúsund volt kaðal berur gjøgnum skriðulopið.

Sum støðan er, fer Strandferðslan tí ikki at flyta fólk um skriðlopið.

Í staðin kannar stovnurin møguleikarnar fyri at at lata Barsskor sigla til Mikladals.

Men tað er aftur ein spurningur um, hvussu atløguviðurskiftini í Mikladali eru, og, hvussu tað er hjá teimum ferðandi at koma til og frá lendingini.

Í løtuni er samstundis skipað fyri eyka tyrlusambandi til Kalsoynna, sigur Strandferðslan.



*Arbeitt verður nú við at fáa Barskorð at sigla til Mikladals*






Lesið eisini ÍtróttaSosialin á alnetinum:

www.sosialurin.fo

# Hóndbólturin fær víðari ræsur

*Hósdagin skrivaði Hondbóltssambandið undir stuðulsavtalur við ávíkavist Føroya Tele og Coca-Cola*



*Andras Róin, stjóri á Føroya Tele, og Petur Ove Petersen, formaður í HSF, skrivaðu hósdagin undir nýggju stuðulsavtaluna*

Jákup Mørk

Fyri føroyskan hondbólt var dagurin í gjár ein sannur merkisdagur. Fyrrapartin hósdagin varð nevnliga hildin tíðindafundur, har tvær nýggjar sponsoravtalur vórðu undirskrivaðar. Sponsoravtalur, sum væntandi koma at hava alstóran týdning fyri áhaldandi menningina av arbeiðinum hjá HSF.

### Fyrsta av sínum slag

HSF hevur frammanundan havt stuðlar, men hesir hava mest verið avmarkaðir til leikskráirnar, landsdystir og steypafinalur. Nakran veruligan høvuðsstuðul hevur talan ongantíð verið um.

Frá hósdegnum varð hetta tó broytt, tí komandi tvey árini verður Føroya Tele høvuðsstuðul hjá HSF.

Afturfyri at lata eina ávísa upphædd, sum formaðurin hjá HSF ikki vildi upplýsa, fer Føroya Tele framvyir at fáa sítt navn fram í so at siga øllum tí, sum HSF tekst við. Hetta merkir, at felagið fær logo sítt á atgongumerki, kappingarskipan, brævpappír og annars á alt tað, sum HSF letur fara út av húsinum, eins og tað til allar dystir í fremstu mans- og kvinnudeildunum verða hongd lýsingarskelti frá Føroya Tele.

Til staðar at undirskriva avtaluna var stjórin hjá Føroya Tele, Andras Róin, og hann vísti eisini á týdningin, sum tað hevði fyri felagið at verða nevnt í positivum samanhangi úti í fjølmiðlunum.

Skemtiliga tók hann til, at fólk helst vóru troytt av at hoyra um samstarvsavtalur í Sibiria, kaðalslit og skeivar telefonrokningar, og vónaði hann, at nýggja avtalan kundi føra felagið fram á meira positivan hátt.

### Steypakappingin skiftur navn

Fleiri staðni uttanlands hava steypakappingarnar seinnu árini skift navn, so hesi samsvara við navnið á stuðlunum aftan fyri kappingina.

Í nógvum førum er tað alheims risin, Coca-Cola, sum stendur aftanfyri hesar navnabroytingar, og nú er hetta so eisini komið til Føroyar.

Komandi árið eita steypakappingarnar í hondbólti ikki longur steypakappingarnar, men verður kappingin nú rópt Coca-Cola steypakappingin.

Eins og við sponsoravtaluni við høvuðsstuðulin, skrivaðu HSF og P/F Poul Hansen, sum er føroyskt umboð fyri Coca-Cola, undir avtalu hósdagin. Ein avtala, sum fyri fyrst er galdandi í eitt ár, men eftir formanni HSF's at døma, er als ikki óhugsandi, at avtalan innan leingi verður longd við enn tveimum árum.

Eins og hjá Føroya Tele verður hjá Coca-Cola galdandi, at vørumerkið kemur at verða sjónligt í samband við steypakappingardystir. Harafturat hevur Coca-Cola eisini fingði pláss á leikskránni umframt at navnið verður prentað á øll atgongumerki, sum verða seld gjøgnum árið.

Høgni Hansen, sum vegna Poul Hansen, skrivaði avtaluna við HSF undir, tóktist eins spentir og hondbóltsmenninir um, hvussu avtalan fór at hilnast, tá hann í stuttari røðu ynskti HSF tillukku við avtaluni, sum hann vónaði kom at gagna arbeiði felagsins.

### Tørvurin er har

At upphæddirnar koma at gagna arbeiðnum, tykist lítil, fyri ikki at siga eingin ivi at vera um.

Um landsliðsarbeiði greiddi Kári Mortensen, sum flestu munnu bera kenslu á, frá, at tá aðalfundurin fyri trimum árum síðani gjørdi av at fara undir aftur hetta arbeiði, varð roknað við, at framtíðin fór at betra um fortreytirnar fyri hesum.

Feløgini bóru fyrstu árini part av kostnaðinum sjálvi, tá tey, umframt at lata part av atgongumerkjagjaldinum, eisini rindaðu eina ávísa upphædd fyri hvønn landsliðsleikara.

Longu tá varð roknað við, at veddingarpengarnir eisini fóru at gerast eitt gott ískoyti, tá hesir komu, og hesir gjørdu tað eisini møguligt at fara undir arbeiðið við A-landsliðunum. Eitt arbeiði, sum inniber stórar avbjóðingar komandi tíðirnar, við dystum hjá bæði kvinnum og monnum í altjóða høpi.

Tær avtalur, sum í gjár vórðu skrivaðar undir, metir Kári hava alstóran týdning fyri framhaldandi menningina av arbeiðinum, tí hetta letur upp fyri enn fleiri møguleikum.

Umframt sjálvt landsliðsarbeiðið, gevur hetta eisini HSF víðari karmar til skeiðvirksemi av ymsum slag. Virksemi, sum kemur øllum hondbóltinum til góðar, og sjálvsagt eisini í seinasta enda landsliðnum.

Eisini legði Kári dent á, at við eini øktari eksponering av hondbóltinum veksur áhugin eisini, og at hetta aftur gevur møguleika fyri enn størri umtalu. - Alt í alt ræður um at gerast ein partur av eini positivari ringrás, sum eg haldi okkum nú vera um at gerast ein partur av, segði Kári.

### Skipanin og alnetið

Umframt undirskrivan av sponsoravtalum varð eisini kappingarskipan avdúkað á tíðindafundinum, og hendan tykist í ár nógv størri í vavi, enn hon hevur verið undanfarin ár.

Jógvan Martin Mørk, formaður í kappingarnevndini greiddi frá, at orsøkin til vælvaksnu skipanina vóru tvinnar.

Onnur er, at yngru deildirnar nú verða skipaðar í ein bólk, so dystartalið hjá liðunum verður so stórt sum tilber. Eisini tí hetta minkar um óhepnu avleiðingar, sum tað hevur við sær, tá lið verða tikin úr kappingini.

Har umframt er ein onnur orsøk eisini stóra talið av liðum, sum í ár eru tilmeldað hondbóltskappingini.

Talið í ár er 176 lið, sum eru 10 fleiri enn í fjør.

Seinasti parturin av fundinum var at greiða eitt sindur frá heimasíðuni hjá HSF. Enn er hendan ikki heilt liðug, men við at fara inn á heimasíðuna hjá Útvarpinum, www.uf.fo, ber til at leita seg inn á hesa. Um eina viku ella so, verður henda løgd út á sjálvstøðuga navnaøkið, www.hsf.fo.

Tað skal ikki gerast nøkur eftirmeting av heimasíðuni her, men í stuttum kann sigast, at síðan tykist vera væl uppbygd, eins og allir neyðugir hentleikar eisini tykjast at vera at finna.




*Hondbóltsskipanin er nú at fáa kring landið, og á permuni sæst, at stuðlarnir báðir hava fingið sítt pláss*